Leikrit



# Minsti-eingil

Landsmiðstøðin

## Minsti-eingil

Katarina Nolsøe skipaði til leik eftir søgu hjá Marius Johannesen.

## Leikarar:

Minsti eingil
Gabriel
1. verndareingil
2. verndareingil
Ein rødd
Vertskona
Jósef
Maria
1. hirði
2. hirði
3. hirði
Drongur
1. vísmaður
2. vísmaður
3. vísmaður

| | |
|---|---|
| Vanlig skrift: | replikkir |
| *Skráskrift:* | *rørslur og umstøður á pallinum* |

*Klokkan ringir . . .*

*Meðan klokkan ringir, standa einglarnir inni í kóri. Einglarnir syngja saman við floytuspæli.*

Nú ringja kirkjuklokkur so hátt
við himmalskum gleðiljóð:
Tað stundar mót jólanátt,
tá Jesus var føddur hin góði.

Øll ung og gomul, samlist nú brátt
og lýðið á gleðiljóðið:
Tað var um halgu jólanátt,
at Jesus varð føddur hin góði.

*Inngangsbønin verður lisin. . .*

*1. sangur:* *Her koma, Jesus, tíni smá . . . . (SFK 106)*

*Í Himlinum: Einglar sita og standa ymsastaðni. Sangur og tónleikur aftanfyri. Gabriel og Minsti-eingil koma inn. Í hølunum koma 1. og 2. verndareingil. Gabriel hevur stóra bók í hondini. Hann slær upp í henni, lesur og vendir sær móti Minsta-eingli.*

Gabriel: Minsti-eingil, hvussu leingi hevur tú verið í einglakórinum?

Minsti-eingil: Í fimm mánaðir, Gabriel.

Gabriel: Ja, tað er rætt. Og hesa tíð hevur tú bert verið okkum ein plága.

Minsti-eingil: *(við grátirødd)* Hvussu tá?

Gabriel: Ferð eftir ferð hevur verið kært um teg.

Minsti-eingil: Hvat skeivt havi eg gjørt, Gabriel?

Gabriel: Hvat tú hevur gjørt? Tú hevur millum annað roytt fjarðar úr veingjunum hjá Rafael!

Minsti-eingil: Á!! *(suffar).*

Gabriel: Ja, og tú hevur límað glæmuna hjá Mikkjali upp á veggin - er tað ikki so?

Minsti-eingil: Jú, . . . . tað gjørdi eg.

Gabriel: Allar hørpustreingirnar hevur tú slitið!

Minsti-eingil: *(við veikari rødd)* Tað var ikki við vilja. Eg skuldi bert vita, hvussu harpan ljóðaði.

Gabriel: Stjørnurnar hevur tú jagstrað um allan himmalin, og so hevur tú riðið á ælaboganum!

Minsti-eingil: *(slær glaður hendurnar saman)* Ja, tað var sooo stuttligt!

Gabriel: Hetta er vánaligur atburður fyri ein kórdrong í einglakórinum. Heldur tú ikki, at tú hevur borið teg illa at?

Minst-eingil: Eg havi ikki biðið lova mær uppí. Tit eru øll so vaksin og góð. Eg vil sleppa at spæla og stuttleika mær.

Gabriel: Eg veit tað, barn mítt, men tú vart valdur fram um aðrar í einglakórið, tí rødd tín er sum hjá einum sangfugli. Um stutta tíð fáa vit brúk fyri henni, tí niðri á jørðini fer at verða stór hending - tann størsta um allar ævir.

Minsti-eingil: Á, Gabriel. Sig mær um tað!

Gabriel: Eg veit ikki, um tú dugir at tiga við tí, um eg nú sigi tær tað.

Minsti-eingil. Ájú! Tað dugi eg! Eg eri kanska óskikkiligur, men eg slatri ikki!

*Teir fara út saman við verndareinglunum.*

Rødd: Men í sætta tíma varð Gabriel eingil sendur av Gudi til eina

bygd í Galileu, sum eitur Nasaret, til eina jomfrú, ið var trúlovað einum manni, sum æt Jósef, av Dávids ætt; og navn jomfrúnnar var Maria. Og eingilin kom inn hjá henni og segði: „Heil veri tú, sum náði hevur fingið! Harrin er við tær, tú sum ert vælsignað av kvinnum!“ Men hon var heilt óttafull av hesum orðum, og hon hugsaði um, hvat henda heilsan mundi hava at týða. Og eingilin segði við hana: „Óttast ikki, Maria! Tí at tú hevur funnið náði hjá Gudi. Og sí, tú skalt verða við barn og eiga ein son, og navn hansara skalt tú kalla Jesus. Hann skal verða stórur og verða kallaður sonur hins hægsta, og Gud Harrin skal geva honum hásæti Dávids, faðirs hansara; og hann skal verða kongur yvir ætt Jákups allar ævir, og á kongadømi hansara skal eingin endi verða.“ Men Maria segði við eingilin: „Hvussu kann hetta bera til, við tað at eg ikki veit av manni?“ Og eingilin svaraði og segði við hana: „Heilagi andin skal koma yvir teg, og kraft hins hægsta skal skugga yvir teg, tí skal eisini hitt heilaga, sum borið verður í heim, verða kallað sonur Guds.“

Luk. 1,26-35

*Gabriel, Minsti-eingil og verndareinglarnir koma innaftur.*

Gabriel: So, tú skilir, Minsti-eingil, at um tú skalt vera við í hátíðarhaldinum, tá sjálvur sonur Guds verður føddur, mást tú skikka tær betur. Tá er ikki nóg mikið, at tú dugir at syngja.

Minsti-eingil: Á, góði Gabriel! Eg skal ikki vera óargaligur aftur *(fer at gráta).*

Gabriel: Nú, nú . . . Enn er tíð hjá tær at batna. Í dag sleppi eg tær út um himmalportrið. Kanst gera tríggjar góðar gerðir fyri onnur, skalt tú sleppa við til tað allarfyrsta jólahaldið á jørð.

Minsti-eingil: Ja, eg vil so fegin sleppa við!

Gabriel: Fyrst mást tú niður á jørðina á einum stjørnuskoti.

*Gabriel tekur glæmuna av Minsta-eingli og rættir 1. verndareingli hana.*

Gabriel: Ansa tú glæmuni.

1. verndareingil: *(tekur glæmuna)* Ja, eg skal ansa henni.

*Gabriel tekur veingirnar av Minsta-eingli og rættir 2. verndareingli teir.*

Gabriel: Ansa tú veingjunum.

2. verndareingil: Ja, eg skal ansa veingjunum.

*Gabriel vendir sær móti Minsta-eingli.*

Gabriel: Barn mítt, nú fært tú eina freist at gera alt gott aftur. Royn títt besta.

*Gabriel vendir sær móti einglunum.*

Gabriel: Farið við honum og setið hann á eitt stjørnuskot.

*Gabriel vendir sær móti Minsta-eingli.*

Gabriel: Farvæl, barn mítt! Harrin fylgi tær.

*2. sangur:* *Føgur er foldin . . . (SFK 132)*

*Meðan sangurin verður sungin, fara einglarnir út.*

*Uttanfyri eitt gistihús í Betlehem.*

| | |
|---|---|
| *Rødd:* | *Men tað hendi í teimum døgum, at tað komu boð frá Augustusi keisara um, at allur heimurin skuldi verða skrivaður í manntal. Hetta fyrsta manntalið var, meðan Kvirinius var landshøvdingi í Sýriulandi. Og øll fóru at verða skrivað, hvør í ættarbygd sína.* |
| | *Luk. 2,1-3* |

*Ófriður hoyrist - barnagrátur. . . Vertskonan kemur út.*

| | |
|---|---|
| Vertskonan: | *(suffandi)* Á, sum her er ófriðarligt. Hvussu skal eg faá alt frá hondini? Húsið er fult av fólki, og øll skulu hava mat. Eg eri útlúgvað, og eg vildi ynskt, at hetta barnið helt uppat at gráta! |

*Verskonan fer út. Minsti-eingil kemur inn, hyggur seg í kring.*

| | |
|---|---|
| Minsti-eingil: | Hetta sær kundi verið eitt gistihús. Hvat man henda her í Betlehem, síðan bygdin er full av fólki? |

*Vertskonan kemur.*

| | |
|---|---|
| Vertskonan: | Nú, hvat vilt tú? Sig ikki, at tú eisini biður um innivist, tí her er einki rúm eftir. |
| Minsti-eingil: | Nei, góða kona, tað er ikki ætlan mín, men sig mær: Hví er so nógv fólk her í Betlehem? |
| Vertskonan: | Jú, tað skal eg siga tær so væl. Augustus keisari gav boð um, at øll skulu skrivast í manntal, og tú sært, at bygdin er øll í einum hurlivasa. Eg veit ikki, hvat eg hevði gjørt við hasar rómverjarnar, um eg kom fram á onkran av teimum. Eg havi nú verið á |

| | |
|---|---|
| | fótum síðan kl. 5 í morgun, og enn er allur maturin eftir at gera. |
| Minsti-eingil: | Íðan, kann eg ikki hjálpa tær? |
| Vertskonan: | Tú?? Tú ert alt ov lítil at gera nakra nyttu. Hvaðan kemur tú? Tú ert ikki hiðani úr bygdini, síggi eg. |
| Minsti-eingil: | Nei, eg eri komin úr himli á einum stjørnuskoti. Eg eri ungur og sterkur. Eg kann skrubba og skúra. Lat meg sleppa at royna. |
| Vertskonan: | Eg haldi, tú ert tápuligur, men kanska er tað satt, sum tú sigur. Hygg, her er ein kustur. Far og sópa gólvið í fjósinum. Líkt er til, at bæði kamelar og ásnar koma higar í kvøld, og har sær betur út, um tað er ruddiligt. |

*Vertskonan rættir honum kustin.*

| | |
|---|---|
| Minsti-eingil: | Ja, eg skal sópa bæði væl og virðiliga, so sjálvt ein kongur vil vera nøgdur at gista her. |

*Minst-eingil tekur kustin og syngur, meðan hann sópar. Gabriel kemur fram.*

| | |
|---|---|
| Gabriel: | Minsti-eingil, hetta er tann fyrsta góða gerðin. Tú hevur hjálpt eini útmøddari húsmóðir. Í staðin fyri at hava verið til ampa, hevur tú gjørt nyttu. Tú hevur ruddað og hampað um eitt fjós, so tað nú er nýtiligt sjálvt hjá einum kongi. |
| 3. sangur: | Eitt fjós og ein krubba . . . |

*Minsti-eingil situr og etur eina breyðflís. Steðgar á . . .*

| | |
|---|---|
| Minsti-eingil: | Nú hvíli eg meg eina løtu. Tað var heilt stuttligt at rudda hatta fjósið, og konan var als ikki so ill, sum eg væntaði. Tað var vakurt gjørt av henni at geva mær breyð og mjólk. |

*Minsti-eingil heldur á at eta.*

| | |
|---|---|
| Rødd: | Men eisini Jósef fór úr Galileu, úr bygdini Nasaret, niðan til Judeu, til Dávids bygd, sum eitur Betlehem, tí hann var slektaður av Dávids húsi og ætt, at verða skrivaður, saman við Mariu, trúlovaðu festarmoy síni, sum var við barn. |
| | Luk. 2,4-5 |
| Minsti-eingil: | Her kemur onkur, síggi eg. Tað er seint at vera úti á ferð. Eg vóni, at tey hava fólk at vera hjá. Um ikki, so er synd í teimum. Gott kvøld! |
| Jósef: | Gott kvøld, lítli mín! Eru vit á rættari leið til Betlehems? |
| Minsti-eingil: | Tað eru tit, men eg kvíði fyri, at tit sleppa ikki undir tak í nátt. |
| Jósef: | Ikki undir tak!? Kona mín er ferðamóð, og hon treingir til at hvíla seg. |
| Minsti-eingil: | Eg skal siga tygum, at her er komið so nógv fólk at vera skrivað í manntal. |

*Jósef vendir sær móti Mariu.*

| | |
|---|---|
| Jósef: | Hvat skulu vit nú gera, góða? |
| Maria: | Eg er so móð, Jósef. Eg orki ikki at ganga eitt fet longri. |

*Minsti-eingil leypur upp.*

| | |
|---|---|
| Minsti-eingil: | Nú veit eg, hvar tit kunnu sleppa at vera í nátt! Tit kunnu leggja tykkum í mítt fjós! |

*Maria og Jósef hyggja undrandi upp á Minsta-eingil.*

| | |
|---|---|
| Maria og Jósef: | Í títt fjós?! |
| Minsti-eingil: | Ja, tað fjósið, sum eg ruddaði í morgun. Har er reint og fjálgt. Komið bara við. Eg skal renna undan og spyrja konuna, sum eigur fjósið. Eg veit, hon sigur ja. |
| Jósef: | Tað er frálíkt! Vit koma við tær. |

*Gabriel kemur inn.*

| | |
|---|---|
| Gabriel: | Væl gjørt, barn mítt. Nú hevur tú lært at vera blíður og umhugsin. Eg skal løna tær væl afturfyri. |
| Rødd: | Men tað hendi, meðan tey vóru har, at tíðin kom, at hon skuldi eiga barn. Og hon átti son sín hin fyrstafødda, og hon reivaði hann og legði hann í eina krubbu, tí at ikki var rúm fyri teimum í tilhaldshúsinum. |

Luk. 2,6-7

*4. sangur:* *So milt lýsir stjørnan . . .*

*Í eini líð. Hirðar sita og ansa eftir seyði. Ein drongur situr við einum lambi í fanginum. Ein stór silvurstjørna er hongd upp.*

| | |
|---|---|
| *1. hirði:* | *Hvat man hatta vera fyri ein stjørna, ið lýsir so bjart?* |
| *2. hirði:* | *Eg veit ikki. Eg havi ongantíð sæð hana fyrr!* |
| *1. hirði:* | *Eg haldi, at hon ber boð um okkurt, ið hent er.* |
| *3. hirði:* | *Ja, eg kenni meg so undarligan, sum um okkurt týdningarmikið er hent.* |
| *2. hirði:* | *Hava tit lagt til merkis, hvussu róligur seyðurin er í nátt?* |
| *3. hirði:* | *Ja, og eingir úlvar eru at síggja!* |
| *1. hirði:* | *Okkurt man vera á vási!* |

*5. sangur:* *Nú birtast túsund jólaljós . . .*

*Meðan sungið verður, koma einglarnir inni. Hirðarnir eru ógvuliga óttafullir.*

Hirðarnir: Hvat er hetta?

Gabriel: Óttist ikki; tí sí, eg kunngerði tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði! Og hetta skulu tit hava til merkis: „Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu."

*Og í somu stund eru nógvir einglar rundanum teir.*

Einglarnir: Heiður veri Gudi í hægsta himli, og friður á jørð, og í menniskjum góður tokki!

*Einglarnir fara út.*

1. hirði: Latum okkum nú fara beinanvegin til Betlehem og vita um hesi tíðindi, sum hend eru, og sum Harrin hevur kunngjørt okkum.

*6. sangur:* *Fagur himin er at sjá . . . (SFK 137)*

*Í somu líð. Ein drongur situr við lambinum í fanginum - einsamallur - keddur. Minsti-eingil kemur.*

Minsti-eingil: Hvat bagir tær? Tú sært so keddur út.

Drongurin: Eg eri eisini so keddur. Vit hava beint nú sæð eina so vakra sjón, og ein eingil segði okkum, at ein stórur kongur var føddur í

| | |
|---|---|
| | Betlehem. |
| Minsti-eingil: | Í Betlehem? |
| Drongurin: | Ja, sært tú hasa stjørnuna? Hon stendur beint uppi yvir staðnum, har kongurin er føddur. Seyðamenninir eru farnir við gávum at fagna honum, men eg kundi ikki sleppa við í fjósið. |
| Minsti-eingil: | Í fjósið? Er kongurin føddur í einum fjósi? So má tað vera mítt fjós! Eg vitsti, at okkurt fór at henda. |
| Drongurin: | Ja, og her noyðist eg at sita, tí hetta lambið er sjúkt, og onkur má ansa tí. |
| Minsti-eingil: | Far tú bara avstað. Eg skal ansa lambinum. |

*Minsti-eingil kínir lambinum.*

| | |
|---|---|
| Drongurin: | Vilt tú tað? Tað er væl gjørt av tær! |
| Minsti-eingil: | Tað vil eg fegin. Skunda tær bara! |
| Drongurin: | Hygg, her er mjólkarfløskan. So fari eg, farvæl! |
| Minsti-eingil: | Farvæl! |

*Minsti-eingil hyggur at lambinum og kínir tí.*

| | |
|---|---|
| Minst-eingil: | Á, títt neyðardýr. Tú verður skjótt frískt aftur. |

| | |
|---|---|
| *7. sangur:* | *Fagur himin er at sjá . . . (SFK 137 ø. 4-7).* |

*Meðan sungið verður, koma vísmenninir inn. Teir eru ferðaklæddir við stavi í hendi.*

| | |
|---|---|
| 1. vísmaður: | Lítli mín, veitst tú nakað at siga okkum um hin nýfødda kongssonin? |
| Minsti-eingil: | Hann finna tit í einum fjósi í Betlehem. |

| | |
|---|---|
| 2. vísmaður: | So finna vit hann ivaleyst, um halda fram at fylgja stjørnuni. |
| 3. vísmaður: | Vit eru á veg til hansara fyri at tilbiðja hann. |
| Minsti-eingil: | Ja, haldið tit bara á. Stjørnan vísir tykkum beina kós á fjósið. |

*Vísmenninir fara. Gabriel kemur til Minsta-eingil.*

| | |
|---|---|
| Gabriel: | Barn mítt! Nú stendur tær í boði at sleppa aftur til himmals. Tú hevur gjørt tríggjar góðar gerðir, og tú hevur víst umsorgan og kærleika móti øðrum. Fjós títt og krubban er føðistaður hjá største kongi, heimurin hevur sæð. Skunda tær til Betlehems, og tað vil eydnast tær at syngja við í einglakórinum. So kemur tú við okkum aftur til himmals. |
| *Einglarnir syngja:* | *Frelsari føddur . . .* |

*Í fjósinum eru Maria, Jósef og barnið í krubbuni. Einglar og seyðamenn standa rundanum. Vísmenninir koma inn. 1. vísmaður fellur á knæ framman fyri barninum.*

| | |
|---|---|
| 1. vísmaður: | Eg ofri tær gull. |

*1. vísmaður rættir barninum gullið.*

| | |
|---|---|
| 2. vísmaður: | (ger á sama hátt) Eg ofri tær roykilsi. |
| 3. vísmaður: | (ger á sama hátt) Eg ofri tær myrru. |

*Vísmenninir reisast. Minsi-eingil kemru inn og leggur seg á knæ.*

| | |
|---|---|
| Minsti-eingil: | Á, sum tú ert vakur! Eg gevi tær hetta lambið. Tað er frískt nú. Tú skalt eiga tað! |

*Minsti-eingil vendir sær móti seyðamonnunum.*

| | |
|---|---|
| Minsti-eingil: | Kann eg tað? |
| Drongurin: | Sjálvandi kanst tú tað. Tað er ein gáva frá okkum øllum. |
| Minsti-eingil: | Takk fyri. Kann eg koma yvir til tykkum, einglar? |
| Einglarnir: | Væl afturkomin, Minsti-eingil! |
| 1. verndareingil: | Her er glæma tín. |

*1. verndareingil setur glæmuna á Minsta-eingil.l*

| | |
|---|---|
| 2. verndareingil: | Og her eru veingirnir. |

*2. verndareingil hjálpir honum við at seta teir uppá.*

| | |
|---|---|
| Gabriel: | So eydnaðist tað tær at syngja við í tí allarfyrsta jólahaldinum á jørð. |

| | |
|---|---|
| *8. sangur:* | *Gleðilig jól . . . (SBK 95)* |

*Meðan sungið verður, koma allirleikararnir inni og stilla seg upp báðumegin við.*

*Útgangsbønin vereður lisin . . .*

*Klokkan ringir . . .*

*Postludium . . .*

*Liðugt.*